# Fatanin av hvør Jesus er: Tann grundleggjandi munurin millum muslimar og kristin



GUÐRÚN MARGRÉT PÁLSDÓTTIR

# Fatanin av hvør Jesus er

Tann grundleggjandi munurin millum muslimar og kristin

# Fatanin av hvør Jesus er

Tann grundleggjandi munurin millum muslimar og kristin

Guðrún Margrét Pálsdóttir

Upprunaliga heitið á bókini:  The Understanding of Who Jesus Is: The Basic Difference Between Muslims and Christians
The Faroese translation – Føroyska umsetingin

(c) Guðrún Margrét Pálsdóttir 2021
Umsett: Steinunn á Geilini Sivertsen
Kápumynd: Karousel ehf – María Ericsdóttir Panduro
Útgevari: WJI útgáfa
Prenting: Leturprent – Stafræna prentsmiðjan
(2021) Reykjavík, Ísland

Henda bók kann prentast og umsetast til ymisk tungumál uttan vinning fyri eygað. Loyvið má tó fáast skrivliga frá rithøvundanum við telduposti: understanding@whojesus.is
Øll kunnu lesa, luta og taka ókeypis eintøk av e-bókini niður av okkara heimasíðu: whoJesus.is

Av tí at Koranin ikki er umsett til føroyskt, eru sitatini úr donsku umsetingini.
Skriftbrotini úr Koranini eru tikin úr:
DEN KLARE KORAN
Oversat af Amér Majid (2017)
https://sunna.dk/koranen

Skriftbrotini úr Bíbliuni eru tikin úr:
BÍBLIAN
Umseting Victor Danielsens frá 1949, endurskoðað 1974
Skriftbrotini eru tikin hiðani:
http://www.biblian.fo/

Skákskriftin í endurgivnu tekstunum, eisini Koranini og Bíbliuni, er áherðsla, sum rithøvundurin hevur valt at brúka.

Til altjóða útbreiðslu
Upprunaliga prentað í Íslandi

ISBN 978-9935-9616-8-6 (PRENT)
ISBN 978-9935-9616-9-3 (PDF)

# Ognað

*Henda bók er ognað muslimsku*
*vinum mínum her í Íslandi,*

*og*

*øllum teimum kring um í heiminum,*
*sum leingjast eftir sannleikanum*

# Innihald


Fororð ........ 9

Inngangur ........ 11

Kapittul 1: Ymisk sjónarmið um Jesus ........ 13

Kapittul 2: Doyði Jesus á krossinum? ........ 21

Kapittul 3: Er Jesus sonur Guds? ........ 33

Kapittul 4: Er Jesus Gud sjálvur? ........ 39

Kapittul 5: Er Jesus frelsari heimsins? ........ 47

Kapittul 6: Er Jesus millummaður millum Gud og menniskja? ........ 51

Kapittul 7: Keldurnar, teirra gildi og trúvirði ........ 55

Endi ........ 63

Nøvn Jesusar í Koranini og í Bíbliuni ........ 64

Jesusar læra, nøkur brot ........ 65

Tilvísingar ........ 67

# Fororð

Tað er ikki heilt av leið at halda, at tey flestu sum fara undir at lesa henda bókling, halda seg vita, hvør Jesus er. Henda vitan kann koma av tí, tey hava lisið í Koranini ella í Bíbliuni ella ígjøgnum tað, sum tey fyrr hava hoyrt ella lært.

Hesin bóklingur loyvir lesaranum at grunda á málið úr ymiskum sjónarhornum. Tá ein bert kennir eina síðu, er tað ringt at síggja alla heildina. Tað krevur dirvi, at hyggja at tí sjónarmiði, sum tú ikki kennir so væl enn. Gert tú hetta, fert tú antin at verða styrkt/ur í tí tú heldur, ella møguliga eggjað/ur til at kanna málið nærri, soleiðis at tú gerst trygg/ur í tí, at lív títt er bygt á sannleikan.

Eg eri av hjarta ómetaliga góð við og virði muslimar, kristin og jødar og tey, sum hava aðra trúgv. Men omanfyri alt stendur kærleiki mín til sannleikan. Hann er hornasteinurin, sum eg vil byggja lív mítt á. Í hesum ljósi havi eg kannað bæði Bíbliuna og Koranina, og við hesum bóklingi vil eg geva tær innlit í nakrar høvuðstættir, sum eru skrivaðir um Jesus í hesum báðum serstøku bókum.

Tað er bøn mín, at tú lesur henda bókling við opnum sinni og ert fús/ur at leita eftir sannleikanum um, hvør Jesus veruliga er.

*Guðrún Margrét Pálsdóttir (Gunna Magga)*

# Inngangur

Jødar, kristin og muslimar hava tað til felags, at tey øll trúgva á ein Gud, og tey byggja á eitt grundarlag, sum í ávísan mun líkist; søgur um fólk við sterkari trúgv, so sum Abraham, Móses og aðrir profetar í Skriftini (GT).

Kristin hava somu Bíbliu sum jødar, tey rópa hana Gamla Testamenti, men so hava tey eisini Nýggja Testamenti, sum sigur frá, hvussu Jesus Messias (Kristus) kom, lív hansara og tey fyrstu kristnu.

Muslimar hava Koranina sum grundarlag. Nógvir av persónunum í Bíbliuni ganga aftur í Koranini, men søgurnar eru tó eitt sindur øðrvísi.

Koranin sigur frá um Bókina / Skriftina (Bíbliuna), bókanna fólk (jødar og kristin) og um Jesus sum Messias / Kristus.

Bíblian hevur fleiri enn 300 spádómar um Messias í Gamla Testamenti, og Nýggja Testamentið hevur nágreiniligar frásagnir um Jesu lív. Allar eru skrivaðar av eygnavitnum, sum vísa, hvussu hesir spádómar eru gingnir út við Jesusi.

Harafturat hava nakrir søgufrøðingar frá fyrstu og aðru øld nevnt Jesus í sínum skriftum, og hendingarnar, sum koma fyri har, eru í samsvari við hendingar í Bíbliuni.

Kristin og muslimar eru samd um, at Jesus var Messias, men flestu jødar hava ikki góðtikið Jesus, og teir bíða enn eftir, at Messias fer at koma.

Sjálvt um Jesus og hansara fyrstu lærusveinar vóru jødar, varð Jesus vrakaður av jødisku leiðarunum, og hann varð eisini ákærdur og avrættaður fyri

gudsspottan av teimum religiøsu myndugleikunum. Í dag eru tað tó fleiri jødar, sum skilja, at Jesus sanniliga var tann lovaði Messias.

Í hesum bóklingi fari eg at royna at lýsa fatanina av Jesusi væl og virðiliga, fyri at sannleikin um hann kann koma fram; honum sum muslimar hava stóra virðing fyri, og sum kristin elska og tilbiðja.

*Kapittul 1*

# Ymisk sjónarmið um Jesus

**Bíblian og Koranin eru samd um hetta:**
Jesus var Messias, hann var ein profetur, sannleikans orð, orð Guds. Hann kundi grøða tey sjúku, geva blindum sjón og reisa fólk upp frá deyðum/geva deyðum lív. Tað vóru einglar sum kunngjørdu, at hann fór at koma í heimin, hann var føddur av moyggj, og tískil var føðing hansara yvirnáttúrlig, Gud var uppi í leikinum. Hann fór upp til himmals; hann livir enn og ein dag kemur hann aftur.

**Koranin** sigur, at Jesus er Messias, men hon fer ikki niður í smálutir, tá talan er um hvønn leiklut Messias hevur í aldargomlu spádómunum. Er tørvur á at fáa greiðu á onkrum, ella sum tað stendur í *Koranini 10,94 og 16,43*, um fólk eru í iva ella ikki vita, tá eru tey rádd til at leita eftir svari í Bókini/Skriftini (Bíbliuni) ella spyrja tey, sum hava lisið hana.

Nú fara vit at hyggja at nøkrum spádómum úr Gamla Testamenti um Messias, hesi brot hava upplýsingar um føðing hansara, leiklut og deyða. Hesir aldargomlu spádómar gingu allir út við Jesusi, og hetta kemur alt sera væl fram í samanberingini niðanfyri.

Hvussu hesir spádómar gingu út sæst í evangeliunum í Nýggja Testamenti, og okkurt er eisini í Koranini.

**Spádómar og hvussu teir eru gingnir út:**

Jesu føðing – ein moyggj skuldi eiga hann
**Spádómur:** *Es. 7.14; Es. 9.1-7*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 1.18-25; Luk. 1.26-38; Koranin 19.19-22*
Føðistaður hansara – Hann skuldi føðast í Betlehem
**Spádómur:** *Mik. 5.2*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 2.1-11; Luk. 2.1-7*
Hann skuldi koma við fyrigeving og endurreisn, grøðing og geva blindum sjón
**Spádómur:** *Es. 42.6-7; 61.1-3; Zak. 13.1*
**Spádómur gongur út:** *Mark. 2.1-12,17; Luk. 4.14-21; 6.19; 7.21-22; 11.5-6; 18.35-43; Koranin 3.49*
Hann skuldi verða ímyndin av eyðmjúkleika – ein kongur sum ríður á einum esli
**Spádómur:** *Zak. 9.9*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 27.37; Mark. 11.7-10*
Hann skuldi verða svikin fyri 30 silvurmyntir
**Spádómur:** *Sálm. 41.10; Zak. 11.12-13*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 26.14-15; 27.3-10*
Hann skuldi verða sligin, spottaður og spýttur á
**Spádómur:** *Es. 50.6*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 26.67; 27.26; Mark. 14.65*
Hann skuldi verða krossfestur
**Spádómur:** *Sálm. 22.1-19*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 27.22-44; Mark. 15.16-41; Luk. 23.22-49; Jóh.19.1-37*
Hann skuldi doyggja fyri syndir okkara
**Spádómur:** *Es. 53.4-12*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 26.28; 1. Pæt. 2.24*
Á deyðadegi hansara skuldi sólin myrkna og myrkt skuldi verða frá middegi av
**Spádómur:** *Amos 8.9-10*
**Spádómur gongur út:** *Matt. 27.45; Mark. 15.33; Luk. 23;44*
Hann skuldi verða ljós heimsins
**Spádómur:** *Es. 9.2,6; 60.1-3*
**Spádómur gongur út:** *Jóh. 1.4,9; 12.46*

**Hetta segði Jesus um seg sjálvan, Jóhannes ápostul tekur soleiðis til:**

*"Eg eri breyð lívsins. Tann, ið kemur til Mín, skal ikki hungra, og tann, ið trýr á Meg, skal aldri tysta" (Jóh. 6, 35)*

*"Eg eri ljós heimsins; tann, ið fylgir Mær, skal ikki ganga í myrkri, men hava ljós lívsins." (Jóh. 8.12)*

*"Eg eri dyrnar; tann, ið fer inn gjøgnum Meg, verður frelstur, og hann skal ganga inn og ganga út og finna føði." (Jóh. 10.9)*

*"Eg eri uppreisnin og lívið, tann, ið trýr á Meg, skal liva, um hann so doyr." (Jóh. 11.25)*

*"Eg eri vegurin, sannleikin og lívið…" (Jóh. 14.6)*

*"Eg eri hin góði hirði; hin góði hirði gevur lív Sítt fyri seyðin." (Jóh. 10.11)*

*"Eg eri rótskot og ætt Davids, hin bjarta morgunstjørna." (Op. 22.16)*

*"Eg eri alfa og omega, hin fyrsti og hin síðsti, upphavið og endin." (Op. 22.13)*

*"Tit eru niðanfrá, Eg eri omanfrá; tit eru av hesum heimi, Eg eri ikki av hesum heimi." (Jóh. 8.23)*

*"Verða tit í orðum Mínum, eru tit av sonnum lærisveinar Mínir; og tit skulu skilja sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar." (Jóh. 8.31-32)*

*"Hetta er boð Mítt, at tit skulu elska hvør annan, eins og Eg havi elskað tykkum. Eingin hevur størri kærleika, enn at hann gevur lív sítt fyri vinir sínar." (Jóh. 15.12-13)*

**Yvirlit yvir ymisk sjónarmið, tá talan er um hvør Jesus er**

| **JESUS** | **Messias í Gamla Testamenti** | **Jesus í Nýggja Testamenti** | **Jesus í Koranini** | **Søgu-skrivarar staðfesta** |
|---|---|---|---|---|
| **Føddur av moyggj** | Ja<br>*Esaias 7.14* | Ja<br>*Matt. 1.18-23*<br>*Luk. 1.26-38* | Ja<br>*Koranin 19.19-22* | |
| **Ein profetur** | Ja<br>*5. Mós. 18.18; 34.10-12* | Ja<br>*Ap. 3.20-22*<br>*Matt. 13.57; 21.11* | Ja<br>*Koranin 19.30* | Ja<br>*Lucian 1)* |
| **Orð Guds** | | Ja<br>*Jóh. 1.1-14* | Ja<br>*Koranin 3.45* | |
| **Orð sann-leikans/ Sannleikin** | | Ja<br>*Jóh. 14.6* | Ja<br>*Koranin 19.34* | |
| **Ljós heimsins** | Ja<br>*Esaias 9.2; 60.1-3* | Ja<br>*Jóh. 1.4,9; 12.46* | | |
| **Grøddi sjúk** | Ja<br>*Esaias 61.1; 53.5* | Ja<br>*Luk. 8.43-48*<br>*Matt. 9.35; 21.14* | Ja<br>*Koranin 3.49* | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Gav blindum sjón** | Ja<br>*Esaias 42.6-7* | Ja<br>*Luk. 7.21-22* | Ja<br>*Koranin 3.49* | |
| **Reisti deyð upp / Gav deyðum lív** | | Ja<br>*Luk. 8.49-55* | Ja<br>*Koranin 3.49* | |
| **Gjørdi undur** | Ja<br>*Esaias 35.4-6* | Ja<br>*Mark. 7.32-37* | Ja<br>*Koranin 3.49* | Ja<br>*Tann babylonska Talmud* 2),<br>*Josefus* 3) |
| **Sonur Guds** | Ja<br>*Sálm. 2.7,12* | Ja<br>*Jóh. 3.16*<br>*1. Jóh. 1.3* | Nei<br>*Koranin 19.88-92* | Var tilbiðin sum Gud eftir uppreisnina:<br>*Pliny tann yngri* 4),<br>*Lucian* |
| **Messias/ Kristus** | Ja<br>*Esaias 9.1-7; 61.1-3* | Ja<br>*Matt. 2.1-5* | Ja<br>*Koranin 3.45* | Ja<br>*Tacitus* 5),<br>*Pliny tann yngri,*<br>*Josefus* |
| **Frelsari** | Ja<br>*Esaias 35.4-6* | Ja<br>*Luk. 2.10-11*<br>*Matt. 20.28* | Nei<br>*Koranin 3.84* | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fyrigav syndir** | Ja<br>*Esaias 1.18; 53.3-12* | Ja<br>*Mark. 2.5-12*<br>*Matt. 1.21* | Nei<br>*Koranin 5.75* | |
| **Millum-maður millum Gud og menniskja** | Ja<br>*Esaias 42.6* | Ja<br>*1. Tim. 2.5* | Nei<br>*Koranin 2.255* | |
| **Var Gud sjálvur** | Ja<br>*Esaias 9.6-7; 35.4-5* | Ja<br>*Jóh. 1.1; 20.28-29* | Nei<br>*Koranin 5.72* | |
| **Varð doyptur** | | Ja<br>*Matt. 3.13-17* | | Ja<br>Vanlig fatan mill-um søgu-frøðingar ídag |
| **Varð krossfestur** | Ja<br>*Sálm. 22.2-19* | Ja<br>*Matt. 27.32-50*<br>*Mark. 15.1-37*<br>*Luk. 23.13-46*<br>*Jóh. 19.1-30* | Nei<br>*Koranin 4.157* | Ja<br>Vanlig fatan mill-um søgu-frøðingar ídag<br><u>Fornar keldur:</u><br>*Lucian, Tacitus, Josefus, Tann bab-ylonska Talmud* |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Varð lagdur í eina grøv** | Ja<br>*Esaias 53.9* | Ja<br>*Matt. 27.57-66* | | Ja<br>Viðurkent av flestu søgu-frøðingum |
| **Reis upp frá deyðum** | Ja<br>*Esaias 53.10*<br>*Sálm. 16.10; 49.16* | Ja<br>*Matt. 28.1-15*<br>*Mark. 16.1-7*<br>*Luk. 24.1-7*<br>*Jóh. 20.1-18 Ap. 2.22-27* | Ja<br>*Koranin 19.33* | Ja<br>Niður-støðan hjá heilt nógvum vísinda-monnum í dag<br>Fornar keldur:<br>*Josefus*<br>*Tacitus* |
| **Varð tikin upp til himmals** | Ja<br>*Sálm. 68.18; Dániel 7.13-14* | Ja<br>*Ap. 1.9* | Ja<br>*Koranin 3.55; 4.158* | |
| **Livir enn í dag** | Ja<br>*Esaias 9.6-7* | Ja<br>*Matt. 28.18-20; Op. 1.12-18* | Ja<br>*Koranin 4.158* | |
| **Kemur aftur** | Ja<br>*Dániel 7.13-14* | Ja<br>*Jóh.14.2-3; Ap. 1.9-11; Op. 1.7* | Ja<br>*Koranin 4.159; 43.61* | |

**Spurningarnir niðanfyri vísa høvuðsmunirnar í fatanini av Jesusi hjá muslimum og kristnum:**

Doyði Jesus á krossinum?
Er Jesus sonur Guds?
Er Jesus Gud sjálvur?
Er Jesus frelsari heimsins?
Er Jesus millummaður millum Gud og menniskja?

Koranin sigur nei til allar hesar spurningar, ímeðan Bíblian sigur ja til allar. Nú fara vit at hyggja nærri at hvørjum spurningi sær, og hvørjir munir eru ímillum svarini hjá ávíkavist Koranini og Bíbliuni.

*Kapittul 2*

# Doyði Jesus á krossinum?

**Koranin lærir, at Jesus varð ikki krossfestur.**
*Og fordi de sagde: "Vi har bestem dræbt Messias, Jesus, Marias søn, Allâhs sendebud!" Men de dræbte ham ikke, og de korsfæstede ham ikke; det forekom dem blot således. De, der er uenige om ham, er bestemt fulde af tvivl. De har ingen viden om det, men hælder sig blot til gisninger. De dræbte ham bestemt ikke. Tværtimod, Allâh har taget ham op til sig. (Koranen 4.157-158)*

Tað eru tó nøkur brot í Koranini, sum benda á at Jesus doyði, og at hann var reistur upp frá deyðum.

Sambært Koranini so tosaði Jesus, tá hann var tveir daga gamal, har vísur hann á, at hann fór at doyggja:

*(Jesus-barnet) Han sagde: "Jeg er sandelig Allâhs tjener. Han har givet mig (Evangelie-)Skriften og gjort mig til profet. Og Han har gjort mig velsignet hvor jeg end er, og Han har pålagt mig bøn og almisse så længe jeg lever." (Koranen 19.30-31)*

*"Fred være med mig den dag jeg blev født, den dag jeg dør, og den dag jeg bliver genopvakt, til livet!" (Koranen 19.33)*

Tvey onnur vers siga, at Jesus doyði, men hetta kemur tó ikki so greitt fram í øllum týðingum av Koranini.
*Da Allâh sagde: "O Jesus! Jeg vil tage dig bort og løfte dig op til Mig og rense dig for dem der fornægter troen og sætte dem der følger dig over dem der fornægter troen, indtil Opstandelsens Dag. Så vil I vende tilbage til Mig, og Jeg vil dømme imellem jer om det I stredes om." (Koranen 3.55)*

Serliga í ensku týðingunum av Koranini eru umsetingar, sum eru meira greiðar og geva eina greiðari fatan av versinum:
*And when Allah said: "O Isa, I am going to terminate the period of your stay [on earth]..." (M.H. Shakir translation)*

Arabiska orðið, ið verður brúkt í hesum versi (umsett til "terminated" á enskum ella "gera enda á" á føroyskum) er *mutawaffeeka*. Hetta orð kann hava tvær merkingar, tann mest vanliga merkingin er at hann doyr likamliga, og hin merkingin er, at hann vitjaði Gud í dreymi og fór so aftur í kropp sín. Eitt annað orð við somu merking er brúkt í Koranini 5.117 – har stendur: "du tog mig bort."
*Jeg har ikke sagt andet til dem end hvad Du befalede mig: 'Tjen Allâh (alene); min Herre og jeres Herre.' Jeg var vidne til dem, så længe jeg var iblandt dem, men da du tog mig bort, var Du (alene) vogter over dem. Du er vidne til alt. (Koranen 5.117)*

Líkt er til, at umsetingin úr arabiskum til enskt er broytt við tíðini; tann meira greiða merkingin av hesum arabiska orði *at doyggja* kemur ikki longur so greitt fram í nýggjaru umsetingunum.

| Umseting | Koranin | Tekstur |
|---|---|---|
| M. Muhammad Ali 1917 | 3.55 | *"... I will cause thee to die and exalt thee in My presence..."*<br>*"... Eg fari at lata teg doyggja og lyfta teg upp til Mín."* |
| | 5.117 | *"... but when Thou didst cause me to die..."*<br>*"...men tá tú lætst meg doyggja.."* |
| Sher Ali 1955 | 3.55 | *"... I will cause thee to die a natural death and raise thee to Myself..."*<br>*"... Eg fari at lata teg doyggja ein náttúrligan deyða og lyfta teg upp til mín."* |
| | 5.117 | *"but since Thou didst cause me to die..."*<br>*"men tá tú lætst meg doyggja..."* |
| M.H. Shakir 1983 | 3.55 | *"...I am going to terminate the period of your stay [on earth] and cause you to ascent to Me"*<br>*"Eg fari at gera enda á tíð tíni (á jørðini) og lata teg koma upp til Mín"* |
| | 5.117 | *"...but when you didst cause me to die..."*<br>*"... men tá tú lætst meg doyggja..."* |
| Muhammad Asad 1980 | 3.55 | *"... Verily, I shall cause thee to die, and shalt exalt thee unto Me..."*<br>*"...Sanniliga, eg fari at lata teg doyggja og fari at taka teg upp til Mín..."* |
| | 5.117 | *"... but since Thou hast caused me to die..."*<br>*"...men tá Tú lætst meg doyggja..."* |

| | | |
|---|---|---|
| Rashad Khalifa 1981 | 3.55 | *"... I am terminating your life, raising you to Me..."*<br>*"...Eg geri enda á lívi tínum og taki teg upp til Mín..."* |
| | 5.117 | *"... When you terminated my life on earth..."*<br>*"...Tá tú gjørdi enda á jarðarlívi mínum..."* |
| Mohammad & Osama El-Shinawy | 3.55 | *"... O Jesus, indeed I will take you and raise you to Myself..."*<br>*"... Á, Jesus, sanniliga fari eg at taka teg og lyfta teg upp til Mín..."* |
| 1978 | 5.117 | *"... but when you took me up..."*<br>*"...men tá tú tókst meg upp..."* |

Harafturat, so eru orð í Koranini, sum sipa til, at Jesus doyði eins og onnur sendiboð frá Gudi ígjøgnum tíðirnar:
*Muhammad er kun et sendebud. Før ham er andre sendebude (også) gået bort (Koranin 3.144)*

**Jesusar krossfesting og deyði eru nágreiniliga lýst í Nýggja Testamenti. Hetta er skrivað beinleiðis av sjónarváttum til hendingarnar og teimum, sum hava hoyrt frásagnirnar sagdar av teimum, sum tá vóru hjástødd.**
Søgurnar kunnu lesast her: *Matt. 27.1-56; Mark.15.1-41; Luk.22.47-23.49 og Jóh. 18.1-19.37.* Her verður sagt frá, hvussu Jesus varð handtikin, avhoyrdur og sligin av myndugleikunum, at ein tornakrúna bleiv sett á høvd hansara, at rómverskir hermenn spottaðu og spýttu á hann, og hvussu hann síðani bleiv dømdur til deyða. Eisini er sagt frá, tá hann gekk til avrættingarstaðið, hvussu hann varð negldur ígjøgnum hendur og føtur, og hvussu tað knappliga rann blóð og vatn úr síðu hansara, táið ein hermaður vildi tryggja sær, at hann var deyður, og stakk eitt spjót í síðu hansara. Søgurnar skjalfesta eisini nøvnini hjá summum teirra, ið vóru hjástødd við krossfesting og deyða Jesusar.

**Evangeliini siga frá tí, sum Jesus segði á krossinum, har hann:**

- Bað Gud fyrigeva teimum, sum krossfestu hann, tí teir vistu ikki hvat teir gjørdu. *(Sí  Luk. 23.34)*
- Lovaði øðrum av ránsmonnunum, sum vóru krossfestir saman við honum, at henda sama dag fór hann at verða saman við honum í Paradísi. *(Sí Luk. 23.43)*
- Spurdi Gud, hví Hann var farin frá honum. *(Sí Matt. 27.46; Mark. 15.34)*
- Segði við Mariu mammu sína, at nú var Jóhannes lærusveinur hansara sonur hennara, somuleiðis segði hann við Jóhannes, at nú var Maria mamma hansara. *(Sí Jóh.19.26-27)*
- Segði seg verða tystan. *(Sí Jóh.19.28)*
- Vísti á, at verk sítt á jørðini var liðugt við hesum orðum : *"Tað er fullgjørt" (Jóh. 19.30)*
- Og í deyðastundini segði hann: *"Faðir, í hendur Tínar gevi Eg anda Mín" (Luk. 23.46)*

**Frásagnirnar í evangeliunum innihalda upplýsingar um hvat hendi tann dagin, tá Jesus doyði á krossinum:**

*....Um sætta tíman kom myrkur yvir alt land, tað vardi líka til níggjunda tíma.... Men Jesus rópti við harðari rødd og gav upp andan. Tá skrædnaði forhangið í templinum í tvey, frá í erva líka niður ígjøgnum; jørðin skalv, og klettarnir klovnaðu; gravirnar opnaðust, og likamini av mongum av teimum heiløgu, ið sovnað vóru burtur, risu upp....Men táið høvuðsmaðurin og teir, ið við honum hildu vakt yvir Jesusi, sóu jarðskjálvtan og tað, sum hendi, vórðu teir ógvuliga ræddir og søgdu: "Sanniliga var hesin sonur Guds!" (Matt. 27.45, 50-52, 54)*

**Gev gætur! Evangeliini vóru skrivað av sjónarváttum og í eini tíð, tá onnur fólk, sum eisini vóru hjástødd, enn vóru á lívi; tey mintust hvat og hvussu alt fór fram.**

**Profetarnir í Gamla Testamenti spáddu at Messias fór at doyggja; teir greiddu frá, hvussu og hví hann skuldi doyggja.**

Sálm. 22 byrjar við júst somu orðum sum Jesus rópti á krossinum:
*Gud mín, Gud mín, hví ert Tú farin frá mær? (Sálm. 22.1)*

Hesin sálmur greiðir gjølla frá hvat hendi, tá Jesus varð krossfestur; hann er skrivaður eini 1000 ár áðrenn sjálv hendingin fór fram:
*Eg eri sum vatn, ið verður stoytt niður, allir liðir Mínir fara sundur; hjarta Mítt er vorðið sum vaks, tað bráðnar í brósti mínum. Máttur Mín er tornaður upp sum pottabrot, tungan loðar føst í gómum Mínum, og Tú leggur Meg niður í dust deyðans. Tí hundar standa rundan um Meg, hinir óndu í hópatali sláa ring um meg; teir hava stungið Meg ígjøgnum hendur og føtur. Eg fái talt øll bein Míni; teir hyggja at Mær og halda frægd at tí. Klæði Míni býta teir ímillum sín, um kyrtilin kasta teir lut. (Sálm. 22.15-19)*

Jóhannesar evangeliið sigur frá, hvussu hesin spádómur gekk út, eisini hvat varð gjørt við klæðini hjá Jesusi:
*Táið hermenninir nú høvdu krossfest Jesus, tóku teir klæði Hansara og býttu tey í fýra partar, ein til hvønn hermannin. Somuleiðis kyrtilin; men kyrtilin hevði ongar seymar, men var vovin í einum frá í erva allan vegin. Tá søgdu teir hvør við annan: "Latið okkum kasta lut um, hvør ið skal hava hann!" – fyri at skriftin skuldi ganga út, sum sigur: "Teir býttu klæði Míni ímillum sín og kastaðu lut um kyrtil Mín." (Jóh. 19.23-24)*

Í 53 kapitli hjá Esaiasi profeti er greitt frá, hví Messias skuldi doyggja:
*Vanvirdur var Hann - fólk vendi sær frá Honum - maður, fullur av pínum og kunnigur við sjúku; Hann var sum ein, ið fólk fjalir andlitið fyri, vanvirdur, vit roknaðu Hann fyri einki.*
*Men tað vóru sjúkur okkara, ið Hann bar, tað vóru pínur okkara, ið Hann legði á Seg - og vit hildu Hann vera heimsøktan, slignan og plágaðan av Gudi. Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd. Vit viltust øll av leið sum seyður, vit vendu okkum hvør sín veg; men HARRIN læt*

*falla á Hann skyldina, ið lá á okkum øllum. ... Við treinging og dómi varð Hann tikin burt - men hvør á døgum Hansara hugsaði tað, at táið Hann varð ryktur burt úr landi teirra, sum liva, var tað fyri brot fólks míns, plágan rámti Hann! (Esaias 53.3-6,8)*

**Jesus fortaldi lærusveinum sínum, at hann skjótt fór at doyggja og rísa upp aftur:**
*Frá teirri tíð byrjaði Jesus at gera lærisveinum Sínum kunnigt, at Hann skuldi fara til Jerúsalem og líða nógv av hinum elstu og høvuðsprestunum og hinum skriftlærdu og verða dripin og rísa upp aftur triðja dagin. (Matt. 16.21)*

*Táið Jesus nú fór niðan til Jerúsalem, tók Hann hinar tólv lærisveinarnar burturfrá og segði við teir á vegnum:"Vit fara nú niðan til Jerúsalem, og Menniskjasonurin skal verða givin høvuðsprestunum og hinum skriftlærdu upp í hendur; og teir skulu døma Hann til deyða og geva Hann heidningunum upp í hendur at verða spottaðan, húðflongdan og krossfestan; og triðja dagin skal Hann rísa upp aftur." (Matt. 20.17-19)*
Sí eisini: *Matt. 12.38-40; 16.1-4; 17.22-23; Mark. 8.31-32; 9.31; 10.33; Luk. 9.22.*

**Jesusar deyði er hildin at vera tann hendingin í forntíðini, sum er best skjalfest.** Hetta er ikki bara tí, at frágreiðingarnar í evangeliiunum eru so nágreiniligar, men eisini orsakað av tí sum rómverskir, jødiskir og grikskir søgufrøðingar og rithøvundar hava skrivað. Afturat hesum so vistu øll í Jerusalem, hvat fór fram. Øll tíðarlinjan er skjalfest – frá tí at Jesus var í urtagarðinum Getsemane við lærusveinunum, har hann varð svikin og handtikin, og inntil hann varð hongdur á krossin og síðani lagdur í eina grøv.

Myndugleikarnir vistu, at Jesus hevði sagt sínum lærusveinum, at hann fór at rísa upp aftur av deyðum, tí stongdu og innsiglaðu teir grøvina við einum stórum steini, og rómverskir hermenn fingu boð um at verja grøvina. Hóast hetta var grøvin opin og tóm tann triðja dagin, og likam Jesusar var ikki at finna nakrastaðni. Evangeliið hjá Matteusi greiðir frá hesi hending:
*Tá varð stórur jarðskjálvti; tí eingil Harrans kom niður av Himli, steig til og*

*velti burt steinin og setti seg á hann. Hann var sum snarljós at síggja, og klæði hansara vóru hvít sum kavi. Av ræðslu fyri honum skulvu teir, ið hildu vakt, og vórðu sum deyðir. (Matt. 28.2-4)*

Myndugleikarnir funnu upp á eina søgu fyri at hava okkurt at siga um, hví likam Jesusar var horvið:

*...komu nakrir av vaktini inn í staðin og bóru høvuðsprestunum boð um alt, ið hent hevði. Tá komu teir og hinir elstu saman og hildu ráð; síðani góvu teir hermonnunum nógvan pening og søgdu: "Tit skulu siga: "Lærisveinar Hansara komu um náttina og stjólu Hann, meðan vit svóvu." Og skuldi landshøvdingin fingið hetta at hoyrt, skulu vit tosa við hann og stilla hann og síggja til, at tit kunnu vera tryggir." Teir tóku tá peningin og gjørdu, sum teir vóru lærdir. Og hesi tíðindi komu út millum Jødarnar - til henda dag. (Matt. 28.11-15)*

**Einglar kunngjørdu uppreisn Jesusar:**

*Men fyrsta dagin í vikuni, tíðliga, í lýsingini, komu tær til grøvina og høvdu við sær hinar angandi urtirnar, ið tær høvdu gjørt til. Og tær funnu steinin veltan frá grøvini. Táið tær so fóru inn í hana, funnu tær ikki likam Harrans Jesusar. Táið tær nú ikki vitstu, hvat tær skuldu hugsa um hetta, stóðu hjá teimum tveir menn í skínandi klæðum. Tær ræddust og boygdu andlit síni móti jørðini. Men teir søgdu við tær: "Hví leita tit eftir hinum livandi millum hini deyðu! Hann er ikki her, Hann er risin upp; minnist tað, ið Hann talaði til tykkara, meðan Hann enn var í Galilea, hvussu Hann segði, at Menniskjasonurin skuldi verða givin syndigum menniskjum upp í hendur og verða krossfestur og rísa upp aftur triðja dagin!" (Luk. 24.1-7)*

Stutt aftaná vísti Jesus seg fyri teimum, sum fylgdu honum, fyrst fyri kvinnunum, sum komu til ta tómu grøvina, og seinni fyri lærusveinum sínum:

*Táið nú kvøldið var komið henda dagin, fyrsta dagin í vikuni, og dyrnar vóru stongdar, har sum lærisveinarnir vóru, av ótta fyri Jødunum, kom Jesus og stóð mitt ímillum teirra og segði við teir: "Friður veri við tykkum!" Táið Hann hetta hevði sagt, vísti Hann teimum hendur Sínar og síðu Sína. Tá vórðu lærisveinarnir glaðir - táið teir sóu Harran. (Jóh. 20.19-20)*

Tummas, ein av lærusveinum hansara var ikki hjástaddur við hesa hending. Hann trúði ikki, at hetta var farið fram, og hann segði:
*"Fái eg ikki at síggja naglamerkini í hondum Hansara, og sleppi eg ikki at stinga fingur mín í naglamerkini og stinga hond mína í síðu Hansara, vil eg als ikki trúgva tí!" (Jóh. 20.25)*

Eina viku seinni vísti Jesus seg fyri lærusveinum sínum, tá vendi hann sær til Tummas og segði:
*"Rætt fingur tín higar - hygg hendur Mínar! Rætt hond tína higar og stikk hana í síðu Mína! Og ivast ikki, men trúgv!" (Jóh. 20.27)*

Aftaná at Jesus var risin upp, helt Pætur eina talu í Jerusalem og segði hesi orð:
*Tit menn av Ísrael, hoyrið hesi orð! Jesus úr Nazaret, mann, ið av Gudi varð prógvaður fyri tykkum við kraftargerðum, undrum og teknum, sum Gud við Honum gjørdi mitt ímillum tykkara - so sum tit sjálvir vita - Hann, sum eftir fyriskipaða ráði Guds og fyrivitan Hansara varð svikin, Hann drópu tit - krossfestu Hann við hondum lógloysinga ... Henda Jesus reisti Gud upp - sum vit allir eru vitni um. (Ap. 2.22-23, 32)*

Lærusveinarnir ivaðust ikki í, at Jesus doyði, og at nú høvdu teir eisini sæð tann upprisna Jesus. Pætur skrivar í einum av brøvum sínum:
*Kristus doyði jú eisini eina ferð fyri syndir, rættvísur fyri órættvís, fyri at Hann kundi leiða okkum til Gud. Hann leið deyðan í holdinum, men varð gjørdur livandi í andanum. (1. Pæt. 3.18)*

*- sum sjálvur bar syndir okkara á likami Sínum upp á træið, fyri at vit, deyð frá syndunum, skuldu liva fyri rættvísina... (1. Pæt. 2.24)*

Í 40 dagar vísti Jesus seg fyri lærusveinunum og øðrum við ymisk høvi:
*... síðani varð Hann sæddur av meir enn 500 brøðrum í senn - av teimum liva flest allir enn; nakrir eru sovnaðir; (1. Kor. 15.6)*

Tá hann varð tikin upp til himmals vóru fleiri fólk hjástødd, sum sóu hvat fór fram:
*Táið Hann hetta hevði sagt, varð Hann tikin upp, meðan teir sóu, og skýggj tók Hann burtur úr eygsjón teirra. Sum teir nú stardu upp móti himli, í tí Hann fór burtur, stóðu hjá teimum tveir menn í hvítum klæðum. Teir søgdu: "Tit menn úr Galilea! Hví standa tit og hyggja upp móti himli? Hesin Jesus, sum er tikin upp til Himmals frá tykkum, skal koma aftur, á sama hátt sum tit sóu Hann fara til Himmals." (Ap. 1.9-11)*

Tá ið lærusveinarnir høvdu sæð tann upprisna Jesus, vóru teir ikki longur óttafullir, men fingu heldur áræði av hesi nýggu hending. Tað er lítið sannlíkt, at teir høvdu halgað lívið til at breiða evangeliið út, um teir ivaðust um uppreisn Jesusar. Teir kundu jú verða avrættaðir við at kunngerða deyða og uppreisn hansara. Teir høvdu heldur ikki funnið upp á eina søgu um, at tað vóru kvinnur, sum fyrst vóru vitni til uppreisnina, tí veruleikin er, at kvinnur tá í tíðini vóru ikki hildnar at verða fullgóð vitni sambært lógini.

**Umframt Nýggja Testamenti eru aðrar skriftir, sum siga frá deyða Jesusar, millum annað:**
*Árbøkurnar (15. bók, kapittul 44)* er skrivað í 116 e.kr. av Tacitusi einum Rómverskum søguskrivara og senatori, hann vísur til Jesu krossfesting, og at tað var Pontius Pilatus, ið gav boð um krossfestingina.
*Fornsøgan hjá jødunum (18. bók, kapittul 3.3)* er skrivað av Josefusi einum jødiskum søguskrivara frá fyrstu øld. Hann nevnir eisini Jesus, Pilatus og krossfestingina í hesum søguliga handriti.

Aðrir søguskrivarar, sum t.d. grikkarnir Tallus og Flegon frá Tralles skrivaðu um tað øgiliga myrkur, sum vardi í tríggjar tímar tann dagin, Jesus varð krosfestur, við hesum gingu orðini talað av Amosi profeti í Gamla Testamenti út:
*Tann dag - sigur Harrin HARRIN - skal Eg lata sólina ganga undir um middagin og gera myrkt á jørðini um alljósan dag. Eg skal umskifta hátíðir tykkara í sorg og allar songir tykkara í sorgarsongir; Eg skal klæða allar lendar í sorgarbúna og*

*gera hvørt høvd skallut; Eg skal lata tað verða, sum táið ein syrgir einasta son sín, og lata tað enda við sorgardegi. (Amos 8.9-10)*

**Líkverjan úr Torino** 6) 7) stuðlar undir søguna, sum tey fýra evangeliini greiða frá hendi eftir at Jesus varð tikin niður av krossinum. Jósef úr Arimatea, ein limur í jødiska ráðnum, bað Pilatus um loyvi at lata seg fáa likam Jesusar. Hann ballaði tað inn í nýtt línklæði og legði tað í eina nýggja steingrøv. *(Sí Matt. 27.57-60; Mark. 15.42-46; Luk. 23.50-53; Jóh. 19.38-42).* Evangeliini greiða frá, at sjálvt um likam Jesusar ikki var í grøvini, so lá línklæði eftir. *(Sí Luk. 24.12; Jóh. 20.1-8).* Líkverjan úr Torino verður hildin at verða sama klæði, sum likam Jesusar var ballað inní. Fleiri vísindafólk hava kannað líkverjuna væl og virðiliga. Tá klæðið varð fotograferað kom myndin av einum naknum krossfestum likami týðiliga fram á svørt/hvítu negativunum. Negativini vístu blóðblettir á hondum og fótum, har sum naglarnir vóru negldir ígjøgnum, eisini vóru blóðblettir á síðuni, sum varð stungin, og á høvdinum har tornakrúnan varð sett. Andlitið sæst eisini týðiliga á svørt/hvítu negativunum. Tað er geislingin frá likaminum í líkverjuni, sum hevur sett hetta avrit. Eisini sæst, at onki bein í likaminum var brotið.

Tað var siðvenja at bróta beinini á teimum krossfestu fyri at skunda undir deyðan, og tað ætlaðu tey eisini at gera við Jesus:
*Men táið teir komu til Jesus og sóu, at Hann var longu deyður, brutu teir ikki beinini í Honum. Men ein av hermonnunum stakk Hann í síðuna við spjóti, og við tað sama rann út blóð og vatn. - Tann, ið hevur sæð tað, hevur vitnað tað, og vitnisburður hansara er sannur; hann veit, at hann sigur satt, fyri at eisini tit skulu trúgva. Tí hetta hendi, fyri at skriftin skuldi ganga út: "Einki bein í Honum skal verða brotið." Og uppaftur sigur annað skriftorð: "Tey skulu venda eygunum móti Honum, sum tey hava stungið ígjøgnum." (Jóh. 19.33-37)*

Flestu vísindafólk í dag siga, at tað er ein søguligur veruleiki at Jesus doyði á krossinum, og tey sum hava granskað uppreisnina føra fram, at tað er lítil og ongin ivi um, at uppreisn hansara er farin fram; teir grunda hetta á ta veldigu ávirkan, uppreisnin hevði á tey, sum fylgdu honum eftir.

**So svarini til spurningin um Jesus doyði á krossinum, eru hesi:**

| **Bíblian<br>Gamla<br>Testamenti<br>Ja** | **Bíblian<br>Nýggja<br>Testamenti<br>Ja** | **Aðrar fornar<br>keldur<br>Ja** | **Koranin<br>Nei<br>Ja – at hann<br>doyði** |
|---|---|---|---|
| Nógvir<br>profetar<br>spáddu<br>um deyða<br>Messiasar:<br>*Esaias*<br>*(Kapittul 53)*<br>*Dávid*<br>*(Sálmur 22)*<br>*Amos (8.9-10)*<br>*Zakarias*<br>*(12.10)* | Mong<br>eygnavitni<br>vóru hjá<br>Jesusi heilt til<br>tað síðsta, tey<br>stóðu við<br>krossin, hugdu<br>og lurtaðu<br>eftir honum<br>líka til hann<br>doyði;<br>*Matteus 27.1-*<br>*66*<br>*Markus 15.1-*<br>*41*<br>*Lukas 22.47-*<br>*23.56*<br>*Jóhannes*<br>*18.1-19.42* | Prógv eru<br>funnin í<br>tekstum sum<br>søguskrivarar<br>frá fyrstu og<br>aðru øld hava<br>skrivað:<br>*Tacitus,*<br>*Josefus,*<br>*Lucian,*<br>*Tann*<br>*babylonska*<br>*Talmud* | Nei:<br>Jesus doyði<br>ikki á<br>krossinum<br>*Koranin*<br>*4.157-158*<br>Ja:<br>Ábendingar<br>um at Jesus<br>fór at doyggja:<br>*Koranin*<br>*19.30-31*<br>*Koranin 19.33*<br>Váttar at hann<br>doyði:<br>*Koranin 3.55*<br>*Koranin 5.117*<br>*Koranin 3.144* |

*Kapittul 3*

# Er Jesus sonur Guds?

Koranin og Bíblian hava hvør sína áskoðan, tá tað kemur til spurningin um Jesus er sonur Guds.

**Koranin førir fram, at Jesus bæði var profetur og tann væntaði Messias, og at hann bleiv til við guddómligari uppílegging, men hon tekur ikki undir við ella góðtekur, at hann kann vera sonur Guds:**

*Og ihukom Maria [Maryam] i Skriften; da hun trak sig tilbage fra sin familie til et sted (i huset) mod øst (for at bede). Hun satte et forhæng op for (at isolere sig fra) dem. Derpå sendte Vi Vor Ånd (Gabriel) til hende, som viste sig for hende som et fuldkomment menneske. Hun sagde: "Jeg søger tilflugt hos Den Nådige imod dig - (nærm mig ikke) hvis du er gudfrygtig!" (Gabriel) Han sagde: "Jeg er kun din Herres udsending, (sendt) for at skænke dig en ren søn." Hun sagde: "Hvordan skulle jeg få en søn, når intet menneske har rørt mig, og jeg ikke har været usømmelig? Han sagde: "Således (skal det være). Din Herre siger: 'Det er let for Mig. Vi vil gøre ham til et tegn for menneskene og en barmhjertighed fra Os. Det er en afgjort sag'." (Koranen 19.16-21)*

*Sandelig, med Jesus er det hos Allâh som med Adam; Han skabte ham af jord. Derpå sagde Han til ham: "Bliv til!" og så blev han til. (Koranen 3.59)*

*Det sømmer sig ikke for Allâh at tage sig en søn - priset være Han! Når Han har bestemt en sag, siger Han blot til den: "Bliv til!" og så bliver den til. (Koranen 19.35)*

*Og de siger: "Den Nådige har taget sig en søn!" I (der påstår dette) har bestemt fremført noget afskyeligt! Himlene kunne næsten briste derved og jorden slå revner og bjergene synke i grus, idet de tillægger Den Nådige en søn. Men det passer sig ikke for Den Nådige at tage sig en søn. (Koranen 19.88-92)*

*…himlenes og jordens skaber! Hvordan skulle han have en søn når Han ikke har nogen ledsagerinde? Han har skabt alt, og Han ved alt. (Koranen 6.101)*

*...og de kristne siger: "Messias er Allâhs søn!" Det er hvad de udtaler med deres mund. De snakker dem efter munden som tidligere fornægtede troen. Måtte Allâh tilintetgøre dem! Sikke vildledte de er. (Koranen 9.30)*

*De siger: "Allâh har taget sig en søn!" Priset være Han! Han er Den Uafhængige. Ham tilhører alt i himlene og på jorden. I har ingen bemyndigelse til dette. Siger I om Allâh hvad I ikke ved? (Koranen 10.68)*

*Og for at advare dem der siger: "Allâh har taget sig en søn!" De har ingen viden derom, ej heller havde deres forfædre. Det er store ord der kommer fra deres mund. Det de siger, er ikke andet end løgn. (Koranen 18.4-5)*

**Harafturímóti førir Bíblian fleiri staðni fram, at Jesus er sonur Guds.**

**Úr spádómum í Gamla Testamenti:**
*Eg skal siga frá avgerð. HARRIN segði við Meg: "Tú ert sonur Mín, Eg havi føtt Teg í dag!" (Sálm. 2.7)*

*Kyssið sonin... Sæl eru øll tey, ið líta á Hann! (Sálm. 2.12-13).*

*Men yvir hús Dávids og yvir tey, sum í Jerúsalem búgva, skal Eg hella út náðiandan og bønarandan; tey skulu venda eygunum móti Honum, sum tey*

*hava stungið ígjøgnum; tey skulu syrgja Hann, sum ein syrgir einasta son sín, og gráta sárliga eftir Hann, sum ein grætur eftir frumborna sín. (Zak. 12.10)*

**Úr Nýggja Testamenti:**
*Í sætta mánaði varð Gabriel eingil sendur av Gudi til bý í Galilea, sum eitur Nazaret, til moyggj, sum var trúlovað við manni, ið æt Jósef, av húsi Dávids; moyggin æt Maria. Eingilin kom inn til hennara og segði: "Heil, tú náðaða! Harrin er við tær; signað ert tú millum kvinnur!" Ræðsla fall á hana av orðum hansara, og hon hugsaði um, hvat henda heilsa mundi hava at týða. Tá segði eingilin við hana: "Óttast ikki, Maria! Tú hevur funnið náði hjá Gudi. Nú skalt tú verða við barn og eiga son; Hann skalt tú kalla Jesus. Hann skal verða stórur og kallast Sonur hins Hægsta; og Gud Harrin skal geva Honum hásæti Dávids, faðirs Hansara. Hann skal vera kongur yvir húsi Jákups allar ævir, og ikki skal vera endi á kongadømi Hansara." Tá segði Maria við eingilin: "Hvussu kann hetta verða, við tað at eg veit ikki av manni?" Eingilin svaraði henni: "Heilagi Andin skal koma yvir teg, og kraft hins Hægsta skal skugga yvir teg; tí skal eisini hitt heilaga, ið føtt verður, kallast Sonur Guds." (Luk. 1.26-35)*

*Upphav evangeliums Jesu Krists, Sonar Guds. (Mark. 1.1)*

*... sum Hann frammanundan í heiløgum skriftum hevði lovað við profetum Sínum, um Son Hansara, sum eftir holdinum er føddur av ætt Dávids, og sum eftir Anda heilagleikans er við kraft prógvaður at vera Sonur Guds við uppreisn frá hinum deyðu - Jesus Kristus, Harra okkara. (Róm. 1.2-4)*

*Tað, sum vit hava sæð og hoyrt, kunngera vit tykkum við, so eisini tit kunnu hava samfelag við okkum; og samfelag okkara er við Faðirin og við Son Hansara, Jesus Kristus. (1. Jóh. 1.3)*

*Men liva vit í ljósinum - eins og Hann er í ljósinum - so hava vit samfelag hvør við annan, og blóð Jesusar, Sonar Hansara, reinsar okkum frá allari synd. (1. Jóh. 1.7)*

*Við tað at vit nú hava stóran høvuðsprest, sum er farin ígjøgnum Himlarnar, Jesus, Son Guds, so latið okkum halda fast við játtingina! (Hebr. 4.14)*

*Eftir at Gud forðum mangan og á mangan hátt hevði talað til fedrarnar við profetunum, hevur Hann við endan á hesum døgum talað til okkara við Syninum, sum Hann hevur sett til arvinga alra luta, og sum Hann eisini hevur skapt heimin við. Hann er ljómi dýrdar Hansara og ímynd veru Hansara, og Hann ber alt við orði máttar Síns; tí settist Hann, táið Hann hevði gjørt reinsan fyri syndir okkara, við høgru hond hátignarinnar á hæddini. Og Hann er vorðin so mikið størri enn einglarnir, sum Hann hevur arvað dýrari navn enn teir. Tí við hvønn av einglunum hevur Hann nakrantíð sagt: "Tú ert Sonur Mín..." (Hebr. 1.1-5)*

Orð Jesusar:
*Men Jesus svaraði teimum: "Faðir Mín arbeiðir líka til nú; Eg arbeiði við." Tí lógu Jødarnir Honum enn meiri eftir lívinum, tí Hann ikki bert breyt sabbatin, men eisini kallaði Gud Faðir Sín og gjørdi Seg sjálvan Gudi líkan. (Jóh. 5.17-18)*

*Fær tí Sonurin gjørt tykkum fríar, verða tit av sonnum fríir. (Jóh. 8.36)*

*Eg og Faðirin, Vit eru eitt." (Jóh. 10.30)*

Líknilsini, ið Jesus ber fram í *Matt. 21.33-39* og *Matt. 22.1-10,* eru um hann sjálvan; hann er sonurin og faðir hansara er húsbóndin og kongurin. Í báðum líknilsunum verða tænarar sendir út at gera nakað ávist, teir fara ein í senn, men allir verða slignir, illa viðfarnir ella dripnir.
*Til endan sendi hann son sín til teirra og segði: "Teir fara kortini at hava virðing fyri syni mínum!" (Matt. 21.37).* Líknilsið endar tó við, at sonurin eisini verður dripin.

**Teir illu andarnir vistu, at Jesus var sonur Guds:**
*Táið hinir óreinu andar sóu Hann, fullu teir niður fyri Honum og róptu: "Tú ert Sonur Guds!" Men Hann beyð teimum við nógvum strongum orðum, at teir máttu ikki gera Hann kendan. (Mark. 3.11-12)*

*Mark. 5.1-20* sigur søguna um ein mann, sum píndist av einum illum anda, og hvussu Jesus setti hann í frælsi:
*Táið hann nú sá Jesus langt burtur, rann hann til Hansara, kastaði seg niður fyri Honum og rópti hart: "Hvat havi eg við Teg at gera, Jesus, Sonur hins hægsta Guds! Eg taki Teg í eið um Gud, at Tú pínir meg ikki!" Tí Hann segði við hann: "Far út úr manninum, óreini andi!" (Mark. 5.6-8)*

At Jesus helt seg vera son Guds, sæst týðiliga í tí, sum Jesus segði við lærusveinarnar, táið teir royndi at forða fyri, at hann varð tikin.
*"Ella heldur tú, Eg kundi ikki biðið Faðir Mín, og Hann nú hevði sent Mær meir enn tólv legiónir av einglum! Hvussu skuldu tá skriftirnar gingið út, at so eigur at verða!" (Matt. 26.53-54)*

**Sambært Skriftunum eru Messias og sonur Guds ein og sami persónur:**
*Hann segði við teir: "Men tit, hvønn siga tit Meg vera?" Símun Pætur svaraði: "Tú ert Kristus, Sonur hins livandi Guds!" Tá svaraði Jesus honum: "Sælur ert tú, Símun, sonur Jónas! Tí hold og blóð hevur ikki opinberað tær hetta, men Faðir Mín, sum er í Himli. (Matt. 16.15-17)*

*Men Jesus tagdi. So tók høvuðspresturin til orða og segði við Hann: "Eg taki Teg í eið um hin livandi Gud, at Tú sigur okkum, um Tú ert Kristus, Sonur Guds!" (Matt. 26.63)*

*Men hesi eru skrivað, fyri at tit skulu trúgva, at Jesus er Kristus, Sonur Guds, og fyri at tit - við at trúgva - skulu hava lív í navni Hansara. (Jóh. 20.31)*

Jesus var spottaður á krossinum:
*"Onnur hevur Hann frelst; Seg sjálvan kann Hann ikki frelsa! Hann er jú kongur Ísraels! Lat Hann nú koma niður av krossinum, so skulu vit trúgva á*

*Hann! Hann leit á Gud! Hann frelsi Hann nú, um Hann leggur nakað í Hann! Hann hevur jú sagt: "Eg eri Sonur Guds." (Matt. 27.42-43)*

Í Opinberingini, sum er síðsta bók í Bíbliuni, nevnir Jesus seg sjálvan Son Guds yvir fyri lærisveininum Jóhannesi:
*...Hetta sigur Sonur Guds... (Op. 2.18)*

**<u>Til umhugsunar:</u>**
Tá bæði Koranin og Bíblian siga, at Jesusar føðing var merkt av guddómligari uppílegging, og báðar vísa til hann sum Messias (Kristus), hvussu ber tað tá til, at hann bert er ein boðberi frá Gudi, sum Koranin sigur? Hetta førir til henda viðkomandi spurning: Hvat meinast tað við, tá sagt er, at hann er Messias?

*Kapittul 4*

# Er Jesus Gud sjálvur?

**Bíblian og Koranin eru samdar um, at tað bert er ein Gud, sum eigur at verða tilbiðin.**

**<u>Koranin:</u>**
*Dette er den sande beretning. Der er ingen gud foruden Allâh. Allâh er Almægtig og Vis. (Koranen 3.62)*

*Sandelig, Jeg er Allâh – der er ingen gud foruden Mig. Tjen derfor Mig, og hold bøn til ihukommelse af Mig. (Koranen 20.14)*

**<u>Bíblian</u>**
Fyrsta boð av teimum tíggju, sum Móses fekk frá Gudi er hetta:
*Eg eri HARRIN Gud tín, sum leiddi teg út av Egyptalandi, úr trælahúsinum. Tú mást ikki hava aðrar gudar enn Meg. (2. Mós. 20.2-3)*

Profeturin Esaias skrivaði:
*Og eingin annar Gud er enn Eg, eingin rættvísur og frelsandi Gud er uttan Eg. (Esaias 45.21)*

Jesus siteraði úr skriftunum:
*Tí skrivað er: "Harran Gud tín skalt tú tilbiðja, og Honum eina skalt tú tæna." (Matt. 4.10)*

Tá Jesus varð spurdur hvat boð, hann helt hava størst týdning, svaraði hann: *"Hoyr, Ísrael! Harrin Gud okkara, Harrin er Ein. Og tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum..." (Mark. 12.29-30)*

**Harafturímóti eru Bíblian og Koranin ikki samdar um, at Jesus er Gud sjálvur, sum ein partur av tríeindini – Gud Faðir, Sonur og Heilagi Andi.**

**Koranin:**
*O Skriftens folk! Gå ikke til yderligheder i jeres religion. Sig ikke andet end sandheden om Allâh. Messias, Jesus, Marias søn, er kun Allâhs sendebud og Hans Ord, som Han overbragte til Maria, og en ånd fra Ham. Så tro på Allâh og Hans sendebude, og sig ikke: "Tre (i én Gud)!" Afhold jer derfra - det vil være bedst for jer - Allâh er én Gud. Priset være Han, højt hævet over at have en søn; alt i himlene og på jorden tilhører Ham. Allâh er tilstrækkelig som værner. (Koranen 4.171)*

*De der siger: "Allâh er Messias, Marias søn!" fornægter troen, idet Messias sagde: "O Skriftens folk! Tilbed (alene) Allâh, min Herre og jeres Herre." Enhver, der sætter nogen ved siden af Allâh, for ham har Allâh forbudt Haven, og hans tilholdssted skal være Ilden.... (Koranen 5.72)*

*De der siger: "Allâh er den tredje af tre (guder)!" fornægter (ligeledes) troen - der er ingen gud foruden Den Eneste Gud... (Koranen 5.73)*

*Og når Allâh vil sige: "O Jesus, Marias søn! Sagde du til folk: 'Tag mig og min moder som to guder foruden Allâh?'" Da vil han sige: "Priset være Du! Det tilfalder ikke mig at sige noget som jeg ikke har ret til. Havde jeg sagt det, ville Du bestemt vide det. Du ved hvad jeg rummer, men jeg ved ikke hvad Du rummer; Du alene besidder viden om det skjulte. (Koranen 5.116)*

*Allâh har ikke taget sig nogen søn, og der er ingen anden gud sammen med Ham. For så ville enhver gud blot fjerne det, som han havde skabt, og nogle af dem ville have rejst sig mod andre. Priset være Allâh - hævet over det de påstår! (Koranen 23.91)*

*Sig: "Priset være Allâh, som ikke har taget sig en søn, som ikke har nogen der har del i Hans herredømme og som ikke har (taget sig) nogen beskytter af svaghed. Lovpris Hans storhed! (Koranen 17.111)*

**Bíblian:**

Sjálvt um Bíblian lærir at tað bert er ein Gud, so lýsur hon Gud sum tríggjar persónar: Gud Faðir, Gud Sonur (Jesus) og Heilagi Andi. Lat okkum nú hyggja at nøkrum brotum úr skriftunum, sum vísa til Tríeindina.

Í skapanarsøguni í fyrsta kapittuli í Bíbliuni gevur Gud seg til kennar í 1. persóni fleirtalu.

*So segði Gud: "Latið Okkum gera menniskju í bílæti Okkara, til at vera Okkum lík!" (1. Mós. 1.26)*

Esaias profetur segði hesi orð um komu Messiasar:

*Tí skal nú Harrin sjálvur geva tykkum tekin: Moyggj skal verða við barn og eiga son, og hon gevur Honum navnið Immanuel. (Immanuel merkir Gud við okkum) (Esaias 7.14)*

*Fólkið, sum gongur í myrkri, skal síggja stórt ljós; tey, sum sita í landi deyðaskuggans, yvir tey skal ljósið skína. Tí Barn er føtt okkum, Sonur er givin okkum, og á øksl Hansara skal harraveldið hvíla; Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi. Stórt verður harradømið, endaleysur friðurin... (Esaias 9.2,6-7)*

*Sigið við hini bangafullu hjørtu: Verið hugreyst, óttist ikki! Hyggið, har er Gud tykkara! Hann kemur við hevnd, endurgjald kemur frá Gudi, Hann kemur sjálvur og frelsir tykkum. Tá skulu eygu hinna blindu verða opnað, og oyru hinna deyvu verða latin upp. (Esaias 35.4-5)*

Dánjal profetur fær eina sjón av himli og sigur soleiðis um tað, hann sær:
*Framvegis fekk eg í náttarsjónum mínum at síggja, hvussu Ein, sum líktist menniskjasyni, kom á skýggjum himmalsins; Hann fór yvir til Hin, ið gamal var, og varð leiddur fram fyri Hann. Og Honum varð givið vald, heiður og ríki; allar tjóðir og ættir og øll tungumál skulu tæna Honum; vald Hansara er ævigt vald, sum aldri gongur til grundar, og ríki Hansara er ríki, sum ikki verður lagt í oyði. (Dan. 7.13-14)*

**Nógv onnur vers í Bíbliuni vísa á guddómleika Jesusar:**
*Í upphavi var Orðið, og Orðið var hjá Gudi, og Orðið var Gud. Hann var í upphavi hjá Gudi... Orðið varð hold og tók bústað millum okkara, fullur av náði og sannleika, og vit sóu dýrd Hansara, dýrd sum hana, ið einborin Sonur hevur frá Faðir Sínum. (Jóh. 1.1-2,14)*

Allir tríggir persónarnir í Guds tríeind vóru hjástaddir, tá Jesus varð doyptur:
*Táið nú Jesus var doyptur, kom Hann við tað sama upp úr vatninum, og Himmalin opnaðist fyri Honum, og hann sá Anda Guds dala niður sum dúvu og koma yvir Hann. Og rødd kom av Himli, sum segði: "Hesin er Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til." (Matt. 3.16-17)*
Henda hending er eisini í *Mark. 1.9-11* og *Luk. 3.21-22*

Jóhannes doyparin vitnaði hetta um Jesus:
*"Eg havi sæð Andan dalað niður av Himli sum dúvu, og Hann varð verandi yvir Honum. Eg kendi Hann ikki; men tann, sum sendi meg at doypa í vatni, segði við meg: "Tann, sum tú sært Andan dala niður yvir og verða verandi yvir, er tann, sum doypir í Heilaga Andanum." Og eg havi sæð tað, og eg havi vitnað, at hesin er Sonur Guds." (Jóh. 1.32-34)*

Sami boðskapur ljóðaði, tá Jesus og lærusveinarnir, Pætur, Jákup og Jóhannes fóru upp á eitt fjall at biðja:
*Meðan Hann bað, varð andlit Hansara øðrvísi at síggja, og klæði Hansara vórðu hvít og skyggjandi. Og tveir menn talaðu við Hann; tað vóru Móses og Elias; teir vístu seg í dýrd og talaðu um burturferð Hansara, sum Hann skuldi fullføra í Jerúsalem ... Sum hann segði hetta, kom skýggj og skuggaði yvir teir, og teir*

*ræddust, táið teir komu inn í skýggið. Úr skýnum kom rødd: "Hesin er Sonur Mín, hin útvaldi - hoyrið Hann!" (Luk. 9.29-31, 34-35)*

Í seinna brævi sínum vísur Pætur til hesa hending:
*Tí ikki var tað snilt upphugsaðum ævintýrum, vit gingu eftir, táið vit kunngjørdu tykkum kraft og komu Harra okkara Jesu Krists; nei, vit vóru eygnavitni til hátign Hansara - táið Hann fekk heiður og dýrd frá Gudi Faðir, og slík rødd ljóðaði til Hansara frá hini hátignarligu dýrd: "Hesin er Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til." Hesa rødd hoyrdu vit ljóða av Himli, táið vit vóru við Honum á hinum heilaga fjalli. (2. Pæt.1.16-18)*

Jesus játtaði, at hann var Messias (Kristus), og tískil sonur Guds:
*Men Hann tagdi og svaraði einki. Høvuðspresturin spurdi Hann uppaftur - segði við Hann: "Ert Tú Kristus, Sonur hins hálovaða?" Jesus svaraði: "Eg eri tað; og tit skulu síggja Menniskjasonin sita við høgru hond kraftarinnar og koma við skýggjum himmalsins." (Mark 14.61-62)* Hetta er í samsvari við tað sum Dávid kongur skrivaði í *Sálmi 110.1.*

Jesus var ákærdur fyri gudsspottan:
*Tá tóku Jødarnir aftur upp steinar at steina Hann. Jesus segði við teir: "Mong góð verk havi Eg víst tykkum frá Faðir Mínum; hvørt av hesum verkum er tað, tit steina Meg fyri?" Jødarnir svaraðu Honum: "Tað er ikki fyri nakað gott verk, vit steina Teg, nei, fyri gudspottan, og fyri tað, at Tú, sum ert menniskja, gert Teg sjálvan til Gud!" (Jóh. 10.31-33)*

*Jødarnir svaraðu honum: "Vit hava lóg, sum Hann er sekur at doyggja eftir; tí Hann hevur gjørt Seg sjálvan til Son Guds." (Jóh. 19.7)*

Lærusveinurin Tummas segði, tá hann sá tann upprisna Jesus:
*"Harri mín og Gud mín!" Jesus segði við hann: "Av tí at tú hevur sæð Meg, trýrt tú! Sæl eru tey, sum ikki hava sæð og tó trúgva!" (Jóh. 20.28-29)*

Paulus apostul skrivaði:
*Sama sinnalag veri í tykkum, sum var í Kristi Jesusi! Táið Hann var eins og Gud, roknaði Hann tað ikki fyri rán at vera javnlíki Guds; nei, av Sær sjálvum segðist Hann undan tí, gjørdi Seg eins og tænara og varð menniskjum líkur. Og táið Hann var stigin fram sum menniskja, setti Hann Seg sjálvan lágt, so Hann varð lýðin til deyðan, ja, krossdeyðan. Tí hevur Gud eisini sett Hann ógvuliga høgt og givið Honum navnið, sum yvir øllum nøvnum er. (Filipp. 2.5-9)*

**Jesus greiddi lærusveinunum frá um tríeindina (teir tríggir persónarnir í Guddómseindini), stutt áðrenn hann bleiv handtikin:**
*Elska tit Meg, so haldið boð Míni! Og Eg skal biðja Faðirin, og Hann skal geva tykkum annan Talsmann at vera hjá tykkum allar ævir, Anda sannleikans, sum heimurin ikki kann fáa; tí hann sær Hann ikki og kennir Hann ikki. Men tit kenna Hann, tí Hann verður hjá tykkum og skal vera í tykkum. (Jóh. 14.15-17)*

*"Um nakar elskar Meg, heldur hann orð Mítt, og Faðir Mín skal elska hann, og Vit skulu koma til hansara og taka bústað hjá honum." (Jóh. 14.23)*

*"Hetta havi Eg talað til tykkara, meðan Eg havi verið hjá tykkum; men Talsmaðurin, Heilagi Andin, sum Faðirin skal senda í navni Mínum, skal læra tykkum alt og minna tykkum um alt, sum Eg havi sagt tykkum." (Jóh. 14.25-26)*

*Tit hoyrdu, at Eg segði við tykkum: "Eg fari burtur, og Eg komi aftur til tykkara." - Elskaðu tit Meg, høvdu tit gleðst um, at Eg fari til Faðirin; tí Faðirin er størri enn Eg. (Jóh. 14.28)*

*"Men táið Talsmaðurin kemur, sum Eg skal senda tykkum frá Faðirinum, Andi sannleikans, sum út gongur frá Faðirinum - Hann skal vitna um Meg. Og eisini tit skulu vitna; tí tit hava verið við Mær frá upphavi." (Jóh. 15.26-27)*

*"Tó, Eg sigi tykkum sannleikan: Tað er tykkum til gagn, at Eg fari burtur; tí fari Eg ikki burtur, kemur Talsmaðurin ikki til tykkara, men fari Eg burtur, skal Eg senda tykkum Hann." (Jóh. 16.7)*

*"Eg gekk út frá Faðirinum og eri komin í heimin; Eg fari úr aftur heiminum og fari til Faðirin." (Jóh. 16.28)*

*Eingin hevur nakrantíð sæð Gud; hin einborni Sonurin, sum er í fangi Faðirsins, hevur kunngjørt Hann. (Jóh. 1.18)*

**<u>Til umhugsunar:</u>**
Tað er vert at bíta merki í, at tá Allah tosar í Koranini, brúkar hann oftani 1. persón fleirtal (vit), men tá Gud tosar í Bíbliuni, brúkar hann nærum altíð 1. persón eintal (eg). Tó, sambært bíbliuni er Gud ein eind av trimum persónum, meðan sambært Koranini er Allah bert ein persónur. Hví skuldi Allah tosa við einum fleritalsformi, tá hann bert er ein og ikki hevur son ella annan, sum ræður við honum?

*5. kapittul*

# Er Jesus frelsari heimsins?

**Koranin sigur at Jesus er bæði profetur og Messias, men viðurkennir ikki, at hann er frelsari heimsins; hann er í staðin ein av boðberunum:**
*Messias, Marias søn, var kun et sendebud. Før ham har der været andre sendebude. Og hans moder var en sanddru kvinde. Begge plejede at indtage føde... (Koranen 5.75)*

*Sig: "Vi tror på Allâh og på det der er blevet nedsendt til os og på det der blev nedsendt til Abraham, Ismael, Isak, Jakob og deres efterkommere og på det der blev givet til Moses, til Jesus og til (alle) profeterne fra deres Herre. Vi gør ikke forskel (i troen) på nogen af dem - vi overgiver os til Ham!" (Koranen 3.84)*

**Beint øvugt hesum peikar Bíblian fleiri staðni á, at Jesus sanniliga er frelsari heimsins, sum doyði sum offur fyri syndir okkara:**
*Meðan hann nú hugsaði um hetta, vísti eingil Harrans seg fyri honum í dreymi og segði: "Jósef, sonur Dávid! Óttast ikki at taka til tín Mariu, konu tína! Tí tað, sum í henni er gitið, er av Heilaga Andanum. Hon skal eiga son, og tú skalt kalla navn Hansara Jesus; tí Hann skal frelsa fólk Sítt frá syndum teirra." (Matt. 1.20-21)*

*Har á leið vóru nakrir hirðar, ið lógu úti á markini og hildu náttarvakt yvir fylgi sínum. Nú stóð eingil Harrans fyri teimum, og dýrd Harrans lýsti rundan um teir; tá vórðu teir ógvuliga ræddir. Men eingilin segði við teir: "Óttist ikki! Eg kunngeri tykkum stóra gleði, ið skal verða fyri alt fólkið: Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids.Og hetta skulu tit hava til tekin: Tit skulu finna barn, sveipað, liggjandi í krubbu." (Luk. 2.8-12)*

Jesus segði hetta um seg sjálvan:
*"...eins og Menniskjasonurin ikki er komin at lata onnur tæna Sær, men at tæna sjálvur og geva lív Sítt sum loysigjald fyri mong." (Matt. 20.28)*

**Aðrastaðni í skriftunum finnast líknandi brot:**
*Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd. (Esaias 53.5)*

*...táið Hann varð ryktur burt úr landi teirra, sum liva, var tað fyri brot fólks míns, plágan rámti Hann! (Esaias 53.8)*

*Aftur fyri at sál Hansara hevur havt møði, skal Hann fáa tað at síggja, sum Hann mettast av; harvið, at tey kenna Hann, skal hin rættvísi, tænari Mín, rættvísgera mong, Hann, sum bar misgerðir teirra. (Esaias 53.11)*

*...men Hann hevur borið fram eitt offur fyri syndir og hevur síðani við alla sett Seg við høgru hond Guds. (Hebr. 10.12)*

*...hvussu mangan meir skal tá ikki blóð Kristusar, Hansara, sum við ævigum Anda bar fram Seg sjálvan lýtaleysan fyri Gud, reinsa samvitsku tykkara frá deyðum verkum til at tæna hinum livandi Gudi! (Hebr. 9.14)*

*Og eins og menniskjunum er lagað at doyggja eina ferð - og hareftir er dómur - so skal Kristus eisini, eftir at Hann eina ferð er ofraður til at taka burt syndirnar hjá mongum, aðru ferð - uttan synd - opinbera Seg, teimum til frelsu, sum bíða eftir Honum. (Hebr. 9.27-28)*

*...Hann fyrigav okkum øll misbrot okkara og útstrikaði skuldarbrævið móti okkum, sum við boðum sínum gekk okkum ímóti; Hann tók tað burt við at negla tað á krossin. (Kol. 2.13-14)*

*...reiv okkum frá valdi myrkursins og flutti okkum inn í ríki elskaða Sonar Síns. Í Honum hava vit endurloysingina, fyrigeving syndanna. (Kol. 1.13-14)*

*Tí Gudi líkaði, at øll fyllingin skuldi búgva í Honum, og við Honum at gera alt sátt við Seg - veri tað nú tað, sum á jørðini er, ella tað, sum í Himlunum er - táið Hann gjørdi frið við blóði kross Hansara. (Kol. 1.19-20)*

*...og livið í kærleika, eins og Kristus elskaði okkum og gav Seg sjálvan fyri okkum sum gávu og offur, Gudi til tokkaligan anga! (Ef. 5.2)*

*Verið í tann stað góð hvørt við annað, miskunnsom, so tit fyrigeva hvørt øðrum, eins og Gud hevur fyrigivið tykkum í Kristusi! (Ef. 4.32)*

*Kristus keypti okkum leys undan banni lógarinnar, táið Hann varð bann fyri okkum - tí skrivað er: "Bannaður er hvør tann, ið hongur á træi" (Gal. 3.13)*

*Tí í Kristusi samdi Gud heimin við Seg sjálvan og tilroknar teimum ikki syndir teirra... Verðið sátt við Gud! Hann, sum kendi ikki synd, gjørdi Hann til synd fyri okkum, fyri at vit í Honum skulu verða rættvísi Guds. (2. Kor. 5.19-21)*

*Og vit hava sæð og vitnað, at Faðirin hevur sent Son Sín, heiminum til Frelsara. (1. Jóh. 4.14)*

*...Honum, sum elskar okkum og hevur loyst okkum frá syndum okkara við blóði Sínum og gjørt okkum til kongaríki, til prestar fyri Gudi og Faðir Sínum!... (Op. 1.5-6)*

*Honum geva allir profetarnir tann vitnisburð, at hvør tann, ið trýr á Hann, fær fyrigeving syndanna við navni Hansara. (Ap. 10.43)*

**Sambært Bíbliuni er Jesus lykilin til frelsu:**
*Tí so elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív. Ikki sendi Gud Son Sín í heimin, fyri at Hann skal døma heimin, men fyri at heimurin skal verða frelstur við Honum. Tann, ið trýr á Hann, verður ikki dømdur; tann, ið ikki trýr, er longu dømdur, tí hann hevur ikki trúð á navn einborna Sonar Guds. (Jóh. 3.16-18)*

*Tí eg skammist ikki við evangeliið; tað er jú kraft Guds, hvørjum tí til frelsu, sum trýr... (Róm. 1.16)*

*...men Gud vísir kærleika Sín til okkara við, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar. Mangan meir skulu vit tí, táið vit nú eru rættvísgjørd í blóði Hansara, við Honum verða frelst frá vreiðini. Tí vórðu vit, táið vit vóru fíggindar, sátt við Gud við deyða Sonar Hansara, skulu vit mangan meir, eftir at vit nú eru sátt, verða frelst við lívi Hansara. (Róm. 5.8-10)*

*Tí um tú við munninum játtar Jesus sum Harra og trýrt í hjartanum, at Gud reisti Hann upp frá hinum deyðu, so skalt tú verða frelstur. (Róm. 10.9)*

*Og frelsa er ikki í nøkrum øðrum; heldur ikki er nakað annað navn undir himli, givið millum menniskju, sum vit skulu verða frelst við. (Ap. 4.12)*

*6. Kapittul*

# Er Jesus millummaður millum Gud og menniskja?

**Bæði Bíblian og Koranin siga, at Gud er heilagur, skapari av øllum lutum, almáttugur, alvitandi, er hjástaddur allastaðni og ævigur, og eingin kann nærkast Gudi við nøkrum, ið ein sjálvur hevur sett virði á, sum t.d. egin verk.**

**Koranin sigur**, at ein bert kann fara í forbøn hjá Gudi, um Gud gevur loyvi til tað:
*Allâh - der er ingen gud foruden Ham. Den Levende, Opretholderen. Hverken slummer eller søvn kommer over Ham. Ham tilhører alt i himlene og på jorden. Hvem kan mon gå i forbøn hos Ham uden hans tilladelse? Han ved hvad der venter foran dem og hvad der er bagved dem, og de (skabninger) kan ikke omfatte noget af Hans viden, foruden hvad Han vil. (Koranen 2.255)*

**Sambært skriftini broyttist alt, tá Jesus kom:**
Hetta kom skilliga til sjóndar, tá Jesus doyði, tí tá skrædnaði forhangið, sum skilti tað allar heilagasta frá restina av templinum. Tað var skrætt sundur á ein yvirnátúrligan hátt frá í erva og niður ígjøgnum og er eitt tekin um, at við deyða Jesusar er vegurin nú opin til Guds. Ígjøgnum Jesus kunnu vit við dirvi fara fram fyri hásæti Guds, soleiðis sum tað stendur skrivað í *Heb. 10.19-22* og *4.14-16.*

**Allar bøkur í Bíbliuni peika onkursvegna á tann lovaða Messias:**
12. kapittul í 2. Mósebók greiðir frá páskalambinum, sum við blóði sínum bjargaði ísraelsfólki frá deyða, tá tey flýggjaðu undan trældómi í Egyptalandi. Lambið skuldi verða veðurlamb, uttan lýti og onki bein mátti vera brotið á tí. Tað var ein ímynd av Messiasi sum offurlamb.

Jóhannes doyparin fekk hetta opinberað, tá hann sær Jesus:
*Dagin eftir sá hann Jesus koma til sín, og segði: "Hygg lamb Guds, sum tekur burt synd heimsins! (Jóh. 1.29)*

Pætur ger hesa viðmerking:
*Tit vita jú, at tað var ikki við tí, sum forgeingiligt er - silvuri ella gulli - tit vórðu leyskeypt frá dáraatburði tykkara, sum arvaður var frá fedrunum. Nei, tað var við dýra blóði Kristusar - sum av lýtaleysum og ódálkaðum lambi – (1. Pæt. 1.18-19)*

Lærusveinurin Jóhannes fær eina sjón av himli, har fær hann at síggja, at Jesus er lamb Guds. *(Sí Op. 5.6-14; 7.9-17; 22.1-3)*

**Bæði Bíblian og Koranin viðgera trupulleikan við menniskjanum og syndini, munurin er um trupulleikin er loystur við Jesusi ella ikki –** um Jesus var tann, hann segði seg at vera, og um hann var krossfestur okkum til frelsu, eins og profetarnir høvdu sagt frá, og tey sum fylgdust við honum søgdu seg hava verið vitni til.

Koranin sigur:
*Således er Jesus [ʿÎsâ], Marias søn, med sande ord, hvorom de nærer tvivl. (Koranen 19.34)*

**Bíblian ber klárt og týðiliga fram, at Jesus er einasti millumgongumaður millum Gud og menniskja; ongin fær atgongd til Gud ella himmalin uttanum Jesus:**
*Jesus svaraði honum: "...eingin kemur til Faðirin uttan við Mær. (Jóh. 14.6)*

*Tí kann Hann eisini fullkomiliga frelsa tey, sum koma til Gud við Honum; tí Hann livir altíð at biðja fyri teimum... tí hetta gjørdi Hann eina ferð fyri allar, táið Hann ofraði Seg sjálvan. (Heb. 7.25, 27)*

*So er Hann tá millummaður fyri nýggjan sáttmála, so hini kallaðu skulu fáa hin æviga arv, ið lovaður var, eftir at deyði hevur átt sær stað til endurloysing frá brotunum undir hinum fyrra sáttmálanum. (Heb. 9.15)*

*Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds - teimum, ið trúgva á navn Hansara; (Jóh. 1.12)*

Saul frá Tarsus var ein íðin jagstrari av teimum kristnu, men ein dagin varð hann steðgaður av Jesusi. Tað var á vegnum til Damaskus; hann ætlaði sær at fongsla øll kristin, sum hann kundi finna, og so at føra tey til Jerusalem sum fangar. Henda ferð broytti fullkomiliga lívið hjá Saul, tí eftir hesa hending gjørdist hann ein víðgongdur kristin. Alt hetta kann lesast í *Ap. 9.1 -19.*
*Men meðan hann var á veg og var komin nær til Damaskus, skein knappliga ljós av himli um hann, og hann fall til jarðar og hoyrdi rødd, ið segði við hann: "Saul, Saul! Hví søkir tú at Mær?" Tá segði hann: "Hvør ert Tú, Harri?" Hann svaraði: "Eg eri Jesus, Hann, sum tú søkir at." (Ap. 9.3-5)*

Hesin maður, Saul, gjørdist seinni kendur undir navninum Paulus ápostul. Hann hevur skrivað nógv av brøvunum i Nýggja Testamenti. Lat okkum taka eitt litið brot úr tí hann skrivar:
*Tað er trúvert orð og til fulnar vert at verða fagnað, at Kristus Jesus kom í heimin at frelsa syndarar, og av teimum eri eg hin størsti. (1. Tim. 1.15)*

*Hetta er Gudi, Frelsara okkara, gott og tekkiligt, Honum, sum vil, at øll menniskju skulu verða frelst og koma at kenna sannleikan. Tí ein Gud er, og ein millummaður millum Gud og menniskju, menniskjað Kristus Jesus, sum gav Seg sjálvan til loysigjald fyri øll, til vitnisburð á tíð síni. (1. Tim. 2.3-6)*

*Í Honum hava vit endurloysingina við blóði Hansara, fyrigeving syndanna... (Ef. 1.7)*

Sambært Bíbliuni hava øll menniskju syndað, og fyri at koma til himmals mugu syndir okkara verða fyrigivnar og reinsaðar burtur:
*...øll hava syndað, og teimum fattast dýrd Guds; og tey verða rættvísgjørd fyri einki av náði Hansara, við endurloysingini, sum er í Kristi Jesusi, Honum, ið Gud hevur sett fram sum náðistól við trúgv á blóð Hansara,.. (Róm. 3.23-25)*

*Tí lønin, ið syndin gevur, er deyði, men náðigáva Guds er ævigt lív í Kristi Jesusi, Harra okkara. (Róm. 6.23)*

**Til umhugsunar:**
Bæði Bíblian og Koranin læra at menniskja hevur eina sál, sum livur í ævir, og at øll einaferð fara at standa frammanfyri Gudi á dómadegi, og har fer Gud at avgera, um tey skulu fara til himmals ella til helvitis.

Sambært bæði Koranini og Bíbliuni er tað sera umráðandi at gera góðar gerðir. Sambært Bíbliuni eru góðu gerðirnar í sjálvum sær ikki nóg mikið til at koma inn í himmalin, tær kunnu jú ikki reinsa syndirnar burtur. *(Sí Heb. 9.22)*

Bíblian sigur at Gud av reinum kærleika sendi sín einborna son (Isa) í heimin, soleiðis at vit kunnu liva ævigt saman við Gudi. Tann sum ikki tekur ímóti Jesusi sum harra og frelsara, fortapist í ævir. *(Sí Jóh. 3.16)*

**Tí er spurningurin, um hvør Jesus er, sera týdningarmikil.**

*Kapittul 7*

# Keldurnar, teirra gildi og trúvirði

Sjálvt um Koranin og Bíblian eru samdar á nógvum økjum, eru tær ósamdar um nakrar týdningarmiklar spurningar. Ósemjurnar føra til ein sera átrokandi og avbjóðandi spurning: **Hvat er sannleikin?**

Høvuðsósemjurnar ímillum Koranina og Bíbliuna eru, um Jesus er sonur Guds og um Jesus doyði á krossinum ella ikki. Hetta eru heilt grundleggjandi spurningar.

Fyri at taka ímóti sannleikanum, er neyðugt at hava eitt opið sinni og hjarta: at vilja granska og leita eftir sannleikanum, og tá sannleikin er komin undan kavi, at góðtaka hann. **Spurningurin er sera umráðandi: Hvat er veruligi sannleikin um Jesus?** Vilja vit taka kjansin og finna útav tí, hóast hetta møguliga fer at umbroyta lív okkara?

**<u>Koranin, Bíblian og trúvirði teirra:</u>**

Vit fara nú at samanbera keldurnar:

**Koranin** er vorðin til ígjøgnum profetin Mohammad, sum fekk boðskapin frá eingli.

**Bíblian** er skrivað av profetum, kongum, dómarum, Jesu lærusveinum, tveimum beiggjum hansara, einum lærdum lækna og øðrum gudsóttandi fólkum. Gud fylgdist við og tosaðu beinleiðis við onkran teirra og nógv teirra fingu einglavitjan, og øll vóru innblást av Guds Anda. *(Sí 2. Tim. 3.16)*

Summi skrivaðu tað niður, sum tey høvdu sæð, søgurnar sum tey sóu við sínum egnu eygum. Onnur skrivaðu niður boðskapirnar, tey fingu frá Harranum, bønar- og tilbiðingarsálmar, vísdómsorð, spádómar og sjónir frá Harranum.

**Samanberingar- og trúvirðisyvirlit**

| **Samanberingar-evni** | **Bíblian** | **Koranin** |
|---|---|---|
| Jesus – Sonur Guds | Ja | Nei |
| Jesus – doyði á krossinum | Ja | Nei |
| Niðurskrivaðir spádómar um Messias | Yvir 300 spádómar um Messias eru at finna í Bíbliuni. Teir eru skrivaðir fleiri øldir fyri Jesus føðing. | |

| | | |
|---|---|---|
| Boðskapir frá einglum um hvør Jesus er | Ein eingil vísti seg fyri Mariu, og hann boðaði frá, at hon fór at eiga son, sum fór at verða kallaður Sonur hins Hægsta, Sonur Guds. *(Sí Luk. 1.30-35)*<br>Ein eingil vísti seg fyri Jósefi og kunngjørdi honum, at Maria fór at eiga ein son, sum skuldi frelsa folk sítt frá syndum teirra. *(Sí Matt. 1.20-21)*<br>Ein eingil vísti seg fyri hirðunum úti á markini nær við Betlehem; hann kunngjørdi teimum tey góðu tíðindi at frelsarin, sum er Messias (Kristus), Harrin, var borin í heim. *(Sí Luk. 2.8-11)* | Ein eingil vísti seg fyri Mariu og kunngjørdi henni, at hon fór at eiga son, sum fór at verða kallaður Messias. *(Sí Koranin 3.45)*<br>Ein eingil vísti seg fyri Mohammad profeti og kunngjørdi honum, at Jesus var ikki sonur Guds. *(Sí Koranin 4.171; 6.101; 9.30)* |

| | | |
|---|---|---|
| Eygnavitni sum vitnaðu um, at Jesus var Sonur Guds | Jóhannes doyparin og Jesu lærusveinar: Pætur, Jákup, og Jóhannes – allir hesir fýra hoyrdi rødd av himli, sum kunngjørdi, at Jesus var Sonur Guds, og teir tríggir lærusveinarnir sóu eisini Jesus umbroytast í dýrd. *(Sí Matt. 3.13-17; Luk. 9.28-35)* | |
| Eygnavitni til Jesu kossfesting | <u>Stóðu við krossin:</u> Lærusveinurin Jóhannes, Maria mamma Jesus, mostir Jesus, Maria kona Klopas og Maria Magdalena. *(Sí Jóh. 19.25)* <u>Hugdu at eitt sindur burturfrá:</u> Nógv fólk sum kendu Jesus, eisini kvinnur, sum vóru til gongu og høvdu fylgst við honum úr Galilea. *(Sí Luk. 23.49)* | |

| | | |
|---|---|---|
| Eygnavitni sum vátta at Jesus var upprisin | Tveir einglar vísti seg fyri kvinnunum sum ætlaðu sær at salva likam Jesusar; teir søgdu, at Jesus var risin upp frá deyðum. *(Sí Luk. 24.1-8)*<br>Maria Magdalena, allir lærusveinarnir, Saul úr Tarsus og mong onnur hittu Jesus aftaná uppreisnina. *(Sí Jóh. 20.10-31; Ap. 9.3-7; 1. Kor. 15.6-7)* | |
| Líkverjan úr Torino | Líkverjan úr Torino er hildin at vera Jesu líkverja, sum er varðveitt upp ígjøgnum tíðirnar. Øll tey fýra evangeliini í Bíbliuni nevna hesa líkverju. | |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarkarmur: Frá tí at hendingarnar fóru fram, og fram til tær vóru skjalfestar | Nýggja Testamentið er hildið at verða skrivað í árunum 40 - 100 eftir Kristi føðing. Tey fýra evangeliini eru skrivað millum 60 og 95 e.kr. og tey siga søguna um Jesus; søgan er søgd av ymiskum eygnavitnum. Øll fýra evangeliini greiða nágreiniliga frá Jesu krossfesting og uppreisn. Evangeliið eftir Markus er skrivað uml. 30 ár aftaná krossfestingina, meðan Paulus apostul skrivar sítt fyrsta bræv uml. 50 e.kr. um 20 ár aftaná deyða Jesusar. Hesin smali tíðarkarmur stuðlar undir trúvirðið av skjalfestu hendingunum. | Koranin er skrivað í árunum 610 - 632 e. kr. ella uml. 600 ár eftir at Jesus gekk her á jørðini. |

| | | |
|---|---|---|
| Varðveitsla av frumtekstinum. | Tey elstu varðveittu handritini av Nýggja Testamenti eru dagfest til ár 130 e.kr. Yvir 24.000 handrit úr Nýggja Testamenti eru til í dag, og øll eru í samsvari við hvørt annað, tey vátta tískil at frumteksturin í Nýggja Testamenti er varðveittur og boðskapurin er óbroyttur. | Tey elstu varðveittu handritini av Koranini eru skrivað stutt aftaná at frumteksturin var skrivaður. Hetta bendir á, at frumteksturin í Koranini er varðveittur og boðskapurin er óbroyttur. |

| | | |
|---|---|---|
| Deyðahavsrullurnar 8) funnar í 1946, 1947 og 1956 | Deyðahavsrullurnar eru handrit við brotum úr øllum bókunum í Gamla Testamenti, undantiknar eru tó Nehemias og Ester, men Esaias profetur er við í fullum líki (ein 734 cm long skriftrulla). Hesi handrit eru umleið 2000 ára gomul, og tey eru meinlik øðrum gomlum handritum. Tey vátta, at boðskapurin í Bíbliuni er varð-veittur óbroyttur upp ígjøgnum tíðirnar. | |
| Neyvleikin í tekstinum | Av tí at ein rúgva av spádómum eru gingnir út, og av tí at fornfrøðisligir útgrevstir og søgu-gransking samsvara við hendingar, my-ndugleikapersónar, og bardagar, sum hava verið, umframt livihátt og tíðarlinjur sum eru at finna í Bíbliuni, hevur Bíblian prógvað sín neyvleika. | |

# Endi

Vit enda hesa samanbering við eini yvirlýsing, sum er at finna í Koranini:

*(O Sendebud!) Sig: "Hvis Den Nådige havde en søn, ville jeg være den første der tjente ham." (Koranen 43.81)*

Henda yvirlýsing hevur sannleiksvirði, tí um vit skilja at Jesus er Sonur Guds, so fata vit eisini at hann er verdur at verða tilbiðin.

Jesus segði:
*"Komið higar til Mín, øll tit, ið strevast og hava tungt at bera - Eg skal geva tykkum hvílu!" (Matt. 11.28)*

*"Og Eg eri við tykkum allar dagar, líka til enda tíðarinnar." (Matt. 28.20)*

**Bæði Koranin og Bíblian siga, at vit kunnu líta á orð Jesusar:**
*Således er Jesus [ʿÎsâ], Marias søn, med sande ord... (Koranen 19.34)*

*Jesus svaraði: "...Til tað eri Eg føddur, og til tað eri Eg komin í heimin, at Eg skal vitna um sannleikan. Hvør tann, sum er av sannleikanum, hoyrir rødd Mína." (Jóh. 18.37)*

Góði lesari, um tú hevur lisið hesa bók gjølla, so eri eg vís í, at tú í hjarta tínum veitst, hvør Jesus er, og hvønn týdning tann sannleikin hevur fyri teg.

Við at lesa evangeliini (tey góðu tíðindini) í Nýggja Testamenti, fært tú meiri at vita um henda undurfulla persónin Jesus. Har standa nágreiniligar frásagnir um Jesus, sum bæði kristin og í ein ávísan mun muslimar vísa til.

# Nøvn Jesusar í Koranini og Bíbliuni:

*Í Koranini:*
Isa / Jesus *(Koranin 3.45)*
Messias *(Koranin 3.45)*
Sonur Mariu *(Koranin 19.34)*
Orð sannleikans *(Koranin 19.34)*

*Í Bíbliuni:*
Immanuel *(Esaias 7.14)*
Jesus Kristus (Yeshua Messiah) *(Ap. 4.10)*
Jesus úr Nasaret *(Luk. 24.19)*
Sonur træsmiðin *(Matt. 13.55)*
Menniskjasonurin *(Matt. 25.31)*
Sonur Guds *(Mark. 3.11)*
Jesus, kongur jødanna *(Matt. 27.37)*
Undurfullur ráðgevari *(Esaias 9.6)*
Veldigur Gud *(Esaias 9.6)*
Ævigur faðir *(Esaias 9.6)*
Friðarhøvdingi *(Esaias 9.6)*
Lamb Guds *(Jóh. 1.29)*
Leyvan av ætt Juda *(Op. 5.5)*
Trúfastur og Sannorðaður *(Op. 19.11)*
Orð Guds *(Op. 19.13)*
Harrin Jesus Kristus *(Kol. 1.3)*
Kongur konga og Harri harra *(Op. 19.16)*

# Jesusar læra, nøkur brot

*Jeg vil helbrede blindfødte og spedalske og give døde liv... (Koranen 3.49)*

*Men Eg sigi tykkum: Elskið fíggindar tykkara, signið tey, sum banna tykkum, gerið teimum gott, sum hata tykkum, og biðið fyri teimum, ið háða tykkum og søkja at tykkum. (Matt. 5.44)*

*Alt, sum tit tí vilja, at menniskju skulu gera tykkum, skulu tit eisini gera teimum; tí hetta er lógin og profetarnir. (Matt. 7.12)*

*Tí skulu tit biðja soleiðis:*

*"Faðir okkara, Tú, sum ert í Himli!*
*Heilagt verði navn Títt!*
*Komi ríki Títt!*
*Verði vilji Tín, sum í Himli,*
*so á jørðini við!*
*Gev okkum í dag dagliga breyð okkara!*
*Fyrigev okkum skuldir okkara, sum eisini vit fyrigeva skuldarum okkara.*
*Leið okkum ikki í freistingar,*
*men frels okkum frá illum!*
*Tí Títt er ríkið og valdið, Tín er heiðurin, í allar ævir. Amen." (Matt. 6.9-13)*

# Tilvísingar


1) Lucian of Samosata. (165). *The Passing of Peregrinus (The Death of Peregrinus).* (11-13).
English Translation: A.M. Harmon. (1936). (Vol. 5, p.12-15). Loeb Classical Library edition.
https://earlychurchtexts.com/public/lucian_passing_of_peregrinus.htm

2) *The Babylonian Talmud.* (70-200). English Translation: I. Epstein. (London: Soncino, 1935). Vol. III, Sanhedrin 43a, 281, cited in Habermas. The Historical Jesus, 203.
https://www.bethinking.org/jesus/ancient-evidence-for-jesus-from-non-christian-sources

3) Josephus, Flavius. (93). *Antiquities of the Jews (Book 18,* chapter 3.3)
English Translation: William Whiston. (1737)
https://archive.org/details/completeworksofj03jose/page/94/mode/2up

4) Pliny the Younger. (112). *Epistulae X.96*
English Translation: William Whiston.
www.pbs.org/wgbh/pages/frontline/shows/religion/maps/primary/pliny.html

5) Tacitus, Cornelius. (116). *Annals (Book 15,* chapter 44)
Edited for Perseus, New York by Church, Alfred John and Brodribb, William Jackson. Reprinted 1942. Random House Inc.
http://www.perseus.tufts.edu/hopper/text?doc=Tac.+Ann.+15.44&from-doc=Perseus%3Atext%3A1999.02.0078

6) Good Shepard Film Production. (2016). Part 2 *Science Explains Shroud Image* NEW 2016 Video [Video]. Youtube.
https://www.youtube.com/watch?v=efEDb2jHyMY

7) Reel Truth History Documentaries. (2019, 11. Sept.). *Turin Shroud: The New Evidence (Shroud of Turin) History Documentary Reel Truth History* [Video]. Youtube.
https://www.youtube.com/watch?v=NVovTvDjjCg

8) *The Israel Museum, Jerusalem.* The Dead Sea Scrolls.
Obtained on February 12, 2021 from:
https://www.youtube.com/watch?v=NVovTvDjjCg

DEN KLARE KORAN
Oversat af Amér Majid (2017)
https://sunna.dk/koranen

BÍBLIAN
Umseting Victor Danielsens frá 1949
Endurskoðað 1974
Skriftbrotini eru tikin hiðani:
http://www.biblian.fo/

HVØR ER JESUS? Henda bók roynir at lýsa henda grundleggjandi spurning, og tað verður gjørt við at grunda á tey høvuðsevni viðvíkjandi Jesusi, sum muslimar og kristin eru ósamd um:

- Doyði Jesus á krossinum?
- Er Jesus Sonur Guds?
- Er Jesus Gud sjálvur?
- Er Jesus frelsari heimsins?
- Er Jesus millummaður millum Gud og menniskja?

Hvussu svara Koranin, Bíblian, søguskrivarar og Jesus sjálvur hesum spurningum?

Sjálvt um bókin er lítil í vavi, nertur hon við spurningar, sum eru sera týdningarmiklir. Hon kannar ymiskar keldur og ber svarini saman fyri at vísa, hvør Jesus veruliga er.



Tá alt er sagt og gjørt, og okkara jarðarlív er endað, tá fer tann mest týðandi spurningurin at verða: “Hvat gjørdi tú við Jesus Kristus?” Trúði tú, at hann var ein profetur? Ein søguligur persónur? Ein sum gekk um og gjørdi væl? Ein svakur maður? Ella var hann, tann hann segði seg at vera, Sonurin sum Himmalski Faðirin sendi, bæði Gud og menniskja í einum persóni, Jesus frelsari heimsins. Gunna Magga Pálsdóttir hevur skrivað eina lærda, framúr góða bók um hvør Jesus Kristus veruliga er. Lat ikki hesa bók gleppa tær av hondum, tí hon er ikki bara ein góð bók, men heilt bókstaviliga so er lív títt bundið at tí sannleika, sum er at finna í hesi bók.

–Patricia Bootsma

*Ein av leiðarunum í “Catch the Fire” í Norður- Suður og Miðamerika*
*Hevur skrivað bøkurnar: Convergence, Raising Burning Hearts, A Lifestyle of Divine Encounters*
*Ferðandi prædikufólk og leiðari av “House of Prayer”*

ISBN 978-9935-9616-9-3